Nr. 8 | dec. 2013 | 66. árið

# Kirkjuligt Missiónsblað

## Borgarskapur okkara er á himnum

*Borgaraskapur okkara er á himnum. Fil. 3, 20.*

Trýrt tú á Jesus, ert tú borgari í Guðs ríki.

Tað er so lætt at gloyma tað. Uppgávurnar her á jørð og trupulleikarnir streingja á og hertaka sinn og hugsanir okkara. Samstundis liva vit í einum heimi, har orð og myndir eru ávirkað av einum verðsligum hugsanarhátti. Uttan at tað verður sagt beinleiðis, so verður tosað, sum var hesin heimur alt. Tí ræður um at varðveita lívið í hesum heimi sum longst og at vinna sær so góða lívsgóðsku, sum gjørligt.



Er tað løgið, at mong kristin verða so hugtikin av hesum heimi, at tey gloyma himmalin?

Ja, tað er ófatandi!

Tá ið Guð við orði sínum vissar okkum um, at himmalin er okkara heim, mugu vit skammast. Tað er óskiljandi, at vit hugsa so lítið um teir bústaðir, sum hava kostað Jesusi so nógv at tilbúgva okkum.

Tú ert himmalborgari. Tú ert á veg heim. Hvør dagur leiðir teg nærri málinum.

Nógv í tínum lívi fellur í rætt lag, tá tú sært tað í ljósinum av, at Harrin leiðir teg til himmals. Um Guð gav tær, tað tú tráar eftir, so náddi tú ikki málið. Tá hevði tú bygt tær eitt lítið páradís í hesum heimi.

Trongdirnar og royndirnar, ið Harrin sendir á tína leið, eru neyðugar. Tær eru við til at venda tíni eygu frameftir og heimeftir. Mótgongd og trongd ger tað lættari at varnast heimsins tølan og svik.

Tú ert á veg heim.

Og hvat er í himli?

Fyrst av øllum er Jesus har. Her á jørð sært tú hann ikki, hóast hann gongur við tína lið. Í himli verður alt øðrvísi. Har skalt tú síggja hann andlit til andlits.

Í himli verður títt hjarta hugtikið av Jesu dýrd. Alt, tú gert, verður merkt av honum. Tú skalt liva í hansara ljósi. Hann skal turka hvørt tár av eygum tínum. Tá skal deyðin ikki longur vera til, ikki heldur sorg, ikki heldur skríggj, ikki heldur pínsla.

Hans Erik Nissen
Týtt: Marna Ellingsgaard

# Ein troyst í sorgini

Pápi doyði á sjónum, tá eg var 6 ára gamal. Hetta var um heystið, tá ið roynt var eftir hummara. Tað var um aldarskiftið, áðrenn vit fingu ravmagn, útvarp og veðurtíðindi. Tíðliga hendan morgunin var stilli, men út á dagin øtlaði hann veðrið til storm.

Allir bátarnir úr Aavik komu aftur til lands, uttan okkara. Saman við pápa var mammubeiggi mín. Teir komu ongantíð afturíaftur. Seinri, tá vit børn vóru størri, segði mamma okkum frá, at um morgunin áðrenn teir fóru, høvdu teir eina stutta andakt í køkinum.

Lisið varð úr eini andaktsbók eftir Spurgeon. So bóðu teir Faðir vár og so sungu teir:

Lít allar tínar leiðir
Og alla hjartasorg
Í Harrans hond, sum eigur
alt vald í himnaborg;
hann, sum kann stormar lætta
og leggja brim í sjó
og fjøll og dalar slætta
kann finna fótum slóð.

Men Harrin læt ikki stormarnar lætta hendan heystardagin. Dagar teirra vóru taldir.

Men tað var ein troyst í heimi okkara gjøgnum mong ár, at tað var júst hetta ørindi, teir báðir sungu hendan morgunin.

Asbjørn Aavik
Lea Juul týddi

# Bræv nr. 10

**4-12 2013**

Gerandisdagurin er byrjaður aftur og uppgávurnar eru ikki fáar í tali. Jólini nærkast í hvørjum og skjótt skriva vit ár 2014. Vit eru so smátt við at hugna um heima, við jólaprýði, spæla jólatónleik og hyggja eftir jólasendingum á netinum. Hetta verða fyrstu jólini, vit koma at royna okkum uttan foreldur/verforeldur við familju jólaaftan. Tað verður annarleiðis, men eisini hugnaligt.

Hvat hava so jólini at siga fyri okkum. Næstan tveir mánaðir áðrenn, verða vit mint á at nú verður tað jólaaftan skjótt. Handlar hanga flott pynt upp og selja eitt ótal av pynti. Ja, tað er torført ikki at vita hvørji tíð eru í. S og tveir vinmenn vóru ein túr í vikuskiftinum. Teir vitjaðu eina familju, ið hevði tørv á einum góðum andaligum práti og uppmuntran. At vitja tey varpaði ljós á fleiri ting í okkara lívið, ið vit ofta taka fyri givið. Eitt dømi kann vera borð og stólar. Hendan familjan dekkaði "borð" á gólvinum. Vit ótu eina máltíð saman og hetta var á ein hátt sera hugnaligt. Hvat so.....skulu vit so øll geva okkara borð burtur og eta á gólvinum? Tað hevði verið sera stuttligt, men eisini óneyðugt. Teir seinastu dagarnir hava verið merktir av hesi familjuni. Á ein hátt mangla tey nógv ting og hava fleiri avbjóðingar í gerandisdegnum, men eru so takksom fyri tað tey eiga. Ikki minst eru tey takksom fyri kenna Gud, sum teirra Harra og frelsara. Um vit byrjaðu

uppá ein lista av tingum, ið vit kunnu vera takksom fyri, hevði listin blivið óendaliga langur. Ovast á listanum stendur Jesus. Hann sum varð borðin í hendan heim, fyri at frelsa okkum. Tað er hendan boðskapin, vit takka fyri og ynskja at geva víðari.

Ítøkiliga eru vit nú byrjaði at møtast sunnudag seinnapart í eini kirkju á einari amerikanskari herstøð í býnum. Hetta er ikki nøkur serliga góð loysn eftir sum trygdareftirlitið er stórt og m.a. tók tað út móti einum hálvum tíma hjá einum vini at koma inn síðsta sunnudag. Men vit hava onki annað væl egna stað at møtast, so vit mugu bara vera tolin og biðja Gud geva okkum eitt stað at møtast, sum hóskar betur til okkara støðu.

Týskvøld hittast vit í privatum heimum. Ein dagin skuldu vit taka eina kristna gentu við á møti. Tá vit komu eftir henni bjóðaði mamma hennara okkum temunn, so vit fóru inn á gólvi. Har fingu vit eitt gott prát við bæði mammuna og við eina systir. Fyri nøkrum árum síðani hevði mamman verið í kirkju. Men so hevur hon hoyrt eina rødd siga við seg: “Tú ert muslim og tað skalt tú halda fram við at vera. Tú hevur onki at gera her”. So hon kom ikki aftur um kirkjugátt. Men meðan vit drukku te og prátaðu, spurdi hon so um hon kundi koma við okkum til týskvøldsmøti. Og so vildi hin dótturin eisini við. Vit fóru øll avstað og høvdu eitt signað kvøld saman. So nú er bara at biðja fyri hesum menniskjunum eisini.

Vinarliga
S og J

# Einar dyr vórðu latnar upp

Hvussu langt tað er síðani? Lat meg rokna; men tað ger tað sama. Tað var í hvussu er ikki langt aftan á fyrra heimsbardaga.

Vit, sum tá livdu, vita, at menniskju tá ikki vóru so troytt og at kalla áhugaleys, sum aftan á seinra heimsbardaga. Nei, tey vóru áhugað í politikki og heimsspeki.

Eg var hjálparprestur í einum ídnaðarbýi; men tað hjálpti ikki stórt, at eg hevði verið við í krígnum, ella hevði lisið gudfrøði. Fólk høvdu ta støðu, hvørki at lurta eftir presti ella hoyra gleðiboðskapin. Sjálvsagt komu bara nøkur fá fólk í kirkju.

Eg fór tí á húsavitjan; men menninir vóru til arbeiðis um dagin á verksmiðjunum, og bara konurnar vóru heima. Tær spottaðu meg við orðum sum: “Har sæst! Presturin torir ikki at koma, tá ið menninir eru heima!”

So fór eg á vitjan um kvøldarnar, tá menninir vóru heima. Í einar tveir dagar var støðan ørkymlandi; men so fylktust øll ímóti mær aftur. Tey høvdu eitt slagorð: “Eingin skal tosa við prestin!”

Tað var sera trupult hjá mær. Eg gekk í húsini; fekk eitt stutt kaldligt prát við konurnar, meðan menninir sótu við teirra lið og smírdust hugmóðigir. Eingin heilsan. Onki lógvatak. Eg var sum luft fyri teimum.

Tá ið eg kom aftur í einsemina á kamari mínum aftan á slíkar túrar, mátti eg mangan skríggja av sinnismuni og skomm. Men av og á mátti eg hámeta hesar menn fyri teirra støðufesti. Ja, eg fekk virðing fyri viljastyrki Vestfalana. Samstundis segði eg við sjálvan meg: “Tá tað eydnast orðinum at treingja inn her, fer nakað undurfult at henda.”

Tað hendi eisini. Kristus varð sigurharrin. Og júst í hesum býarpørtum var ein meinigheit stovnað, sum blómar enn.

Dyrnar lótust upp heilt spakuliga.

Eg vil fegin siga frá einari serstakari hending í døgunum tá “hermótið” tók at ridla:

“Kom inn!” hoyrdi eg onkran rópa, tá ið eg róligur bankaði á dyrnar.

Varisliga læt eg hurðina upp og sá inn í eitt rúm, har nógv fólk vóru. Eg síggi tað fyri mær enn – Móðirin stendur við køksborðið og eltir breyð. Pápin, ein eldri arbeiðsmaður, fæst við at leggja viðarsprek í komfýrin. Miðskeiðis í rúminum stendur ein ungur maður og vaskar sær; vaskifatið stendur á einum stóli. Við borðið sita nøkur ungfólk; kanska børn ella verbørn? Eg visti ikki. Nøkur smá børn vimsa aftur og fram á gólvinum. Í stuttum sagt, ein fjøltáttað “fólkamongd”.

“Gott kvøld!” rópi eg inn í hópin. Pápin hugdi upp, “Nú so, prestur!” hini flentu. Frá somu løtu var eg eitt einki fyri teimum øllum. So vendi eg mær til móðurina; men hon lætst, sum hon var deyv. Hon var mín síðsta vón...

Ein ring støða! Skuldi eg fara, meðan tey flentu at mær? Ómøguligt! Í hjarta mínum rópti alla tíðina: “Harri Jesus! hjálp mær!” Og hann hjálpti mær. Eygu míni fullu á ein ungan drong, sum sat í einum horni og handfór ein gittara. Knappliga fór eg yvir til hann og spurdi: “Dugir tú at spæla?” “Nei,” svaraði hann. Tað sang í hjarta mínum, tí hann svaraði í hvussu so er.

“Gev mær gittaran! Eg skal vísa tær tvey greb.” Eg tók avgjørdur gittaran og spældi einar tvær akkordir. Hann hugdi áhugaður eftir fingrum mínum; eg var glaður, at einki klaver var í rúminum! Tá hevði eg einki duga at spælt. Eg dugdi eitt sindur at spæla upp á gittara. Undirvísingin byrjaði. Eg vendi bakið til øll hini og sigi við hin unga mannin: “Hygg her; hetta er D-dur akkordirnar, sum eru heilt einfaldar; við teimum kanst tú spæla undir til nógvar sangir.”

Eg klimpraði á gittaran, at vísa honum hvussu ein spælir.

Hann tók gittaran og royndi. Tað gekk ikki so væl; eg vísti honum einaferð enn, hvussu hann skuldi gera. “Syngið meðan tygum spæla” segði hann. “Ja, fegin”. So spældi eg og sang: “Allir smáir fuglar eru ...”

Hann lurtar undrandi og roynir aftur ...

Eg merki at øll eru púra kvirr. Tey sita spent og lurta eftir okkum. Kortini tori eg ikki at venda mær. Eg kenni tað, sum eygu teirra prika meg í ryggin.

Tað gongur framá hjá honum at spæla.

Hetta er kanska rætta løtan at koma fram við ørindum mínum.

“Skal eg spæla ein sang aftur at?” Hann ger eitt nikk. Nú ræður um! Løtan er komin.

Eg taki gittaran og stemmi hann betur. So syngi eg hámæltur; eg veit, at eg havi ikki góða songrødd. Men her ræður ikki um røddina.

Eg leggi áherðslu á innihaldið:
Hevur rúm tú fyri Kristi?
Lív sítt gav hann fyri teg:
Hann á hjarta títt nú bankar
Sigur tær: "Tað eri eg!" (MS 275).

Tað verður kvirt í rúminum. Enn vendi eg mær ikki, so eg síggi ikki, hvat tey gera, men – tey eru rólig!

So vági eg mær at byrja annað ørindi, síðani triðja. Eingin steðgar mær.

Aftaná taki eg ein vakran ungdómssang; og enn er eingin, sum mælir eitt orð. Eg gleðist og visti tað eisini, at hvat fólk enn hava at siga um kirkjuna og prestin, so er navnið Jesus ein máttur, sum eisini hørð hjørtu mugu boyggja seg fyri.

Aftanfyri meg var vorðið so kvirt, sum roknaðu øll við at hoyra meira. Eg taki aftur undir at syngja:

Lat meg tín altíð verða
trúfastur Harri Guð
eg tær meg sjálvan gevi
stígi á orð títt út!
Tær eg av hjarta prísi,
Burtur rek sorg og sút.

Øll stara at mær. Øll hava lurtað og sitið friðarlig. Pápin suffar tungliga: "Ein vakur sangur!" sigur hann.

"Ja, ein sera týðandi sangur!" sigi eg.

"Hvussu tá?" spyr hann eitt sindur ivandi.

Tað skal eg greiða frá! Men fyrst mugu tit geva mær ein stól, so eg fái sett meg niður! Tað tekur eina góða løtu, skilja tygum!"

Tað er sum eitt undur. Her siti eg við borðið saman við hesum menniskjum, og tey lurta eftir mær, tá eg greiði teimum frá, at eg ikki drívi propagandu fyri nakrari lívsáskoðan. Eg sigi teimum, at eg eri ikki úti eftir nøkrum frá teimum, men at Guð gjøgnum Kristus hevur framt nakað stórt fyri tey øll ...

Og spakuliga, heilt spakuliga opnast einar dyr, sum hava verið stongdar so leingi.

Wilhelm Busch
Emma Jacobsen týddi
Úr Ungdom og Tiden.

## Missiónsuppgávan

Sum nevnt í Kirkjuliga Missiónsblaðnum nr. 6 í ár, byrjaði missiónsarbeiðið í Etiopia í 1960.

Umframt Elsu Jacobsen úr Norðagøtu, sum var útsend hetta sama árið, varð Doris Heinesen úr Klaksvík send til hesa somu tænastu í 1971.

Tað var ein serstøk gleði fyri missiónsvinirnar at kunna stuðla tær.

Elsa kom heim í 1992 og Doris í 1995.

Nú eru mong av teimum, sum tá vóru við, heima hjá Harranum. Vit minnast tey við takksemi.

Tit, sum ung eru, hoyri kallið. Jesus kallar enn í dag.

Emma Jacobsen

Kirkjuliga Missiónsfelagið rindar fyri tvær sendingar til Kina um vikuna. Hesar eru:

**"Popcorn"**

Barnasendingin "Popcorn" vendir sær til tey 9-12 ára gomlu; men nógv børn halda fram at lurta langt upp í tannárini. Sendingin varir 15 minuttir, og sent verður: Bíbliusøga, frásagnir, hoyrispøl, sangir og tónleikur.

Av tí at børnini í skúlanum verða upplærd í kommunistiskum gudloysi, og kristniboðan og upplæring av børnum er bannað, er henda sending sera umráðandi.

"Tíð okkara"

Málbólkurin fyri "Our Time" (Tíð okkara) er foreldur 25 ár og eldri.

Av tí at menninir eru til arbeiðis og ofta hava langar dagar, eru tað mest kvinnurnar, sum lurta.

Sendingin varir 30 minuttir. Fyrra korterið verður nýtt til bíbliuundirvísing; í seinna korterinum verður høvuðsdentur lagdur á evnir viðvíkjandi familjuni: heilsa, hjúnalag, foreldur og børn; og sangur og annað.

Ætlanin við sendingunum er , at lurtararnir vakna og búnast, bæði andaliga og menniskjansliga, gjøgnum ta leiðbeining og boðan, sum verður send.

Norea.dk

# Minni frá barnaárum

Hvør kann gloyma dýrabar barnaminni. Minnist man eitt, koma fleiri fram í huganum. Tá ið ein skal skriva um tað, kann stundum vera trupult at tíðarfesta tey. Hvussu ofta hava menniskju ikki verið nær deyðanum ! Oftari enn ein sjálvur er greiður yvir. Ikki minst í okkara øld, har alt gongur við rúkandi ferð, har bert sekund kunnu skilja okkum frá deyðanum. Jú, tað er eitt undur at ein livir.

Sum ungur fekk eg at vita, at eg helst ikki fór at liva. Tað stóð um lív undir føðingini. Bert nakrar tímar gamal, varð sent boð eftir einum trúgvandi manni, Henrik Eikisdal, at koma at doypa barnið, áðrenn tað doyði. Sostatt byrjaði lív mítt við deyðans gátt. Síðani hevur tað verið har fleiri ferðir.

Ein dagin, tá eg gekk úti á ísinum, brotnaði hann undan mær; tá var eg umleið 5 ára gamal. Ein djarvur drongur úr grannalagnum bjargaði mær í síðstu løtu.

Aftur fyri hetta bragdið, gav eg honum eitt heiðursmerki. Ein pengi, sum var eitt hundrað ára minni um ta norsku grundlógina, við mynd av Eidsvollbygninginum øðrumegin og hinumegin stóð 1814-1914. Ein virðismikil pengi.

Eina aðru ferð, skuldi ein maður hjálpa pápa við at lodda ein bensintanga sum lak. Í somu løtu, sum hann setti tann gløðandi loddiboltin á tangan, sprongdist hann. Eg varð slongdur langan veg.

Eygnabrýr og hár svidnaðust og eg bleiv kolasvartur um andlitið. Eg gloymi ongantíð, tá ið tey bóru meg heim, og mamma sá meg. Hon rópti á Guð og græt. Aftur nær deyðanum.

Pápa dámdi væl hestar. Einaferð átti hann átta hestar. Vit áttu eisini nógv fyl, sum mær dámdi væl at hjúkla fyri. Ein dagin, tá eg kíndi einum fyli, vendi tað sær knappliga á og sparkaði meg mitt í búkin. Tá lá eg í songini í fleiri dagar

Eg plagdi sum ungur saman við vinum mínum at standa á skíðum. Ofta eri eg dottin.

Einaferð breyt eg lærið. Tað bleiv ein long sjúkralega. Eina aðru ferð, eg datt á skíðum, fekk eg skaða í høvdið og misti vitið. Tá eg vaknaði var eg einsamallur. Vinir mínir vóru farnir eftir hjálp.

Eg hugdi rundan um meg og mintist ikki, hvussu eg var komin higar. Eg

visti heldur ikki, hvar eg var. Á veg heim var eg svimbul og spýði fleiri ferðir. Eg hevði eisini ilt í høvdinum. Aftur nær deyðanum. Eitt summarið var eg saman við øðrum burturi í haga og ansaði kríatúrum. Tá bleiv eg knappliga sjúkur. Eg hevði nógva pínu og høgan fepur. Boð vóru send oman í bygdina.

Nakrir menn komu við einari børu og bóru meg oman mitt um náttina í oysandi regni. Tá hevði eg blindtarmsbruna.

Morgunin eftir varð eg borin umborð á bátin "Orkdal" og sendur til St. Elisabeths hospital í Tróndheimi. Veðrið var gott og sólin skein frá klárum himni. Sjúkrabøran stóð á dekkinum. Tað, ið eg minnist best frá ferðini, var, at ein gomul kona úr Lapplandi setti seg hjá mær. Hon bað inniliga til Guð um, at hann mátti gera meg frískan. Hon endaði við at biðja "Faðir vár". Eg var so sjúkur, at eg var líkasælur um alt, sjálvt um eg visti, at eg var burtur frá Guði; tá var eg 14 ár.

Pápi fekk boð frá læknanum, sum segði , at eg hevði búkhinnubruna. Meira kundi hann ikki siga, fyrr enn eg var skurðviðgjørdur.

Á sjúkrahúsinum hitti pápi ein trúboðara, sum ofta hevði verið heima hjá okkum. Teir báðir fóru inn í eitt rúm, har teir boygdu knø og róptu til Guð um miskunn. Hesin trúboðarin segði mær fleiri ár seinri, at tað sum nívdi pápa mest, var tað, at eg ikki var frelstur. Hann bað: "Góði Guð, frels son mín og tú skalt eiga hann og brúka hann sum tú vilt!" Aftur einaferð, nær við deyðans gátt. Men Guðs náði var stór, hann frelsti lív mítt. – Trý ár seinri frelsti hann eisini sál mína.

*Tí at eg veit, hvørjar ætlanir eg havi í hyggju við tykkum, sigur Harrin, ætlanir um frið og ikki um ógævu, til tess at veita tykkum vónríka framtíð.* Jer. 29,11.

Undurfulli Guð!

Gabriel Eikli

Lea Juul týddi

# "Biðið fyri arbeiðinum!"



# Upplining hjá Arnu Vågen

Hendan frásøgn er um nakað, ið hendi Arnu Vågen, sum var einkjan eftir Tormod Vågen, aðalskrivara í Norsk Luthersk Misjonssamband. Hann doyði brádliga 3. apríl 1970.

Arna, sum var sjúkrasystir, greiðir frá fyrstu jólunum, hon var einkja.

"Tað var avgjørt nakað frammanundan jólum, at eg skuldi halda jól saman við soninum Tore og míni kæru sonarkonu. Tey vildu ikki, at eg skuldi sita einsamøll jólaaftan.

Men stutt undan jólum, varð eg spurd frá Reyða Krossi, um eg vildi taka eina vakt jólanátt. Tey vóru ráðaleys.

"Nei, jólaaftan havi eg lovað at vera saman við mínum, so tað ber ikki til," svaraði eg. Tey góðtóku ikki svarið; spurdu um eg so kundi koma aftan á midnátt? Tað var vónloysi í røddini í hinum endanum á telefonini. Tá svaraði eg: "Ja." Eg skilti, at tey vóru í eini pínligari støðu á klinikkini. Eg roknaði heldur ikki við nøkrum svøvni kortini, fyri mítt viðkomandi, hesa nátt.

Tá eg kom til Reyða Kross um midnáttarleitið, vísti tað seg, at eg skuldi sita uppi yvir eini eldri konu, sum lá fyri deyðanum. Døtur hennara tvær, sum høvdu sitið hjá henni nátt og dag í nærum tvær vikur, trongdu til at vera avloystar. Tær søgdu mær, at mamman hevði onki orð sagt í meira enn eina viku. Hvørgin teirra var trúgvandi.

Sum náttin leið, skilti eg, at endin nærkaðist, og tilkallaði døturnar, sum svóvu í einum rúmi nærhendis; tær komu beinanvegin til sjúkrastovuna.

"Hava tit báðar hug at biðja Faðirvár saman við mammu tykkara nú?" spurdi eg.

Tær komu stillisliga yvir til songina. Eg legði hendur teirra oman á hendur móðurinnar, og byrjaði at biðja.

Tá hendi nakað undarligt.

Gamla kvinnan, sum fyri okkum at síggja, var heilt burtur, og ikki hevði snakkað í meira enn eina viku, byrjaði – knappliga at taka lut í bønini. Við klárari og týðiligari rødd bað hon saman við okkum alt Faðirvár. Døturnar báðar brustu útúr at gráta.

Tveir tímar seinri varð gamla konan flutt yvir um markið.

Eg kendi tað sum nakað av einglasonginum yvir Betlehems vøllum gav endurljóð á sjúkrastovuni, og í mínum egna hjarta.

Eg mátti bara takka Guði fyri eina ríka uppliving hesa jólanátt, sum eg hevði stúrt so nógv fyri.

Úr bókini: "I samtale med Arna Vågen" eftir Kristine Skjeslien

Emma Jacobsen týddi.

BRÆV

## Fællesbrev nr. 108

## Vandløse d. 03.12.2013

Peter skrivar

### Jul i Danmark

Vi havde ikke lige planlagt, at julen år 2013 skulle fejres i Danmark, men det er blevet vilkåret i den verden, hvor vi stadig må slås med synden og syndens følger sygdom og død. Men midt i denne kamp må vi igen og igen høre det guddommelige befrielsesbudskab, der blev forkyndt julenat. Der er født en frelser!

Sidst jeg skrev, var Anne-Lene lige udskrevet fra Rigshospitalet, og skulle nu restituere sig. Vi var blandt andet et par gange på Lolland – 2. gang var Anne-Lene med. Vi kiggede på huse. Om det er en kødelig lyst eller ej, kan man jo så overveje. Men hvad med at have et billigt godt hus, hvor alle ens ting kan være, og som kan bruges som base, når vi er hjemme på orlov. Anne-Lene kan jo alligevel ikke længere være tilknyttet Færøerne, da hun dér skal være tilmeldt folkeregistret 6 uger, før hun kan gå til læge og sygekassen dækker. Missionærlejligheden i Hillerød eksisterer heller ikke længere. Men et hus tæt ved standen og offentlig transport og ikke så langt fra indkøb, der kan stå med lidt varme på og hvor en lokal for en billig penge kan slå græs og klippe hæk og kigge lidt efter det. Det var da en tanke. Og så er Lolland (evt. Falster) jo et godt bud, da huset vi var nede at se på sammen med Kim, der er håndværker og bor på Lolland, kostede 195.000. Det blev dog ikke det hus.

Men hvor gør man af de bøger, man slet ikke kan lade være med at købe i Danmark, når der ikke er plads til at få dem med til Tanzania eller en rejse til Færøerne, hvor de kunne opmagasineres i Elmars kælder, ikke lige er i planen. Loftet hos min lillesøster i Haslev kan ikke blive ved med at modtage alle de gode tilbud, jeg falder for… Og så er der lige alle de ting, der lige er brug for, når turen går hjem i utide, ting, som godt nok findes opmagasineret i læssevis et eller andet sted f.eks. lange underbukser, men som ikke lige er til at få fat på, når man står og skal bruge dem, og så købes der nye, og så bliver de opmagasineret, når turen går tilbage til Tanzania igen, og lageret af f.eks. lange underbukser vokser for hver gang…

Og så er det nok godt at blive mindet om, at vi ikke skal samle os skatte på jorden, som møl og rust fortærer… Selvom forfatterne selvfølgelig skriver, for at vi skal købe deres bøger, og boghandlerne og genbrugsbutikkerne sælger for at få lidt fortjeneste og for at vi kan få del i alle de mange spændende overvejelser og historier, der er i mange bøger…

## Indlagt igen

Huset er blevet sat lidt på pause, da Anne-Lene fik ulideligt ondt i ryggen, da hun var med nede på Lolland. Det var dog ikke Lollands skyld. Det var nok held i uheld, da hun senere på dagen blev indlagt på Gentofte, og der konstaterede de, at hun havde fået stafylokokker (formodentlig på Rigshospitalet i forbindelse med de tidligere operationer), og at det formodentlig var stafylokokker i lungen, der forårsagede smerterne. Efter næsten 4 ugers undersøgelser og antibiotikabehandling på Gentofte, blev hun overført til Rigshospitalet, hvor de i fredags tog hele hendes ventilsystem ud, da det var inficeret af stafylokokker. Et nyt drænsystem blev lagt eksternt, dvs. at den overskydende spinalvæske ikke ryger ned i hjertet, men opsamles i en pose udenfor. De fortsætter så med antibiotika-behandlingen, og når der er renset op, så skal der lægges et nyt drænsystem internt.

Vi venter

Vi venter på Jesu genkomst, hvor han gør alt nyt. Og imens vi lever i den forventning, venter vi på at stafylokokkerne bliver nedkæmpet og et nyt drænsystem lagt, så turen kan gå tilbage til Tanzania. Og imens må familien leve med, at jeg valfarter fra den ene til den anden og låner en seng eller en sofa, selvom jeg lige nu har belejret et kontor i Vanløse, da jeg helst skulle færdiggøre et afskedshæfte til Rukwa i denne måned. Og så er der møderne i Nansensgade søndag eftermiddag, hvor vi får dét, der står, når alt andet falder sammen, nemlig Guds Ord. Og så er det på dansk… Det er også et privilegium. Tak for jeres fortsatte forbøn for Anne-Lene.

Kærlig hilsen
og Guds fred
Peter

**Nýggir haldarar**

Eg ynski at halda “Kirkjuligt Missiónsblað”.

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr. og bygd/býur: ____________________

Undirskrift: ____________________

*At senda til:*

Kirkjuligt Missiónsblað, Kongsgil 23 kj., FO-100 Tórshavn

# Jólanátt

Tað er nátt. Og tað er myrkt. Eisini í einum fjósi í Betlehem. Ein oksi stendur og jaglar. Seyðurin amast upp at vegginum í fjósinum, og asnin prutlar stillisliga. Náttin er eins og allar aðrar nætur. Men knappliga lyftir oksin høvdið. Seyðurin stendur friðarligur, og asnin lurtar. Tað verður ljósari og ljósari inni í fjósinum, og skjótt fáa djórini næstan ikki hugt orsakað av tí sterka ljósinum, sum eisini skínur uttan fyri fjósið.

Djórini undrast á, hvaðani ljósið kemur, men so sær asnin, at eitt barn liggur í krubbuni, sveipað í klæði. Hetta er eitt vanligt barn, men ljósstrálur lýsa út frá barninum, og tað eru tær, sum gera, at tað er vorðið so ljóst inni í fjósinum. Djórini skilja einki av hesum.

Asnin stendur og hugsar um, hvussu tað var, tá ið hann var lítil. Hann minnist, at hann var á ferð við abba sínum, sum dró ein vogn aftan á sær. Tað var ein strævin ferð, tí vegurin var so vánaligur, sólin brendi, og so rópti og skeldaði maðurin í vogninum, samstundis sum hann bresti við koyrlinum, tí hann helt, at tað gekk ov seint. Asnin mintist, hvussu móður hann var, og at hann hevði ilt við at fylgja við. Honum longdist eftir at sleppa at hvíla seg, at fáa gras at eta og vatn at drekka. Men enn var langt eftir, og asnin var um at missa mótið.

Abbin vendi sær so móti asnanum og segði: "Nú skal eg fortelja tær eina søgu, sum abbi hevur fortalt fyri mær, og sum abbi hansara fortaldi fyri honum, og sum abbi abba hansara eisini fortaldi ............... Tá einaferð langt síðani var tað ein kongur, sum æt Balak. Hann helt, at heimurin var bannaður, og serliga ísraelsfólk, tí tey ætlaðu at ganga gjøgnum hansara land. Tí gjørdi hann av at banna ísraelsfólk, so at hann kundi vinna á tí.

Kongurin sendi tí boð eftir Bileam og segði við hann: " Tú skalt banna ísraelsfólk fyri meg. "Bileam svaraði Balak: " Eitt má eg siga tær, og tað er, at eg kann bert banna ísraelsfólk, um tað er Guðs vilji." "Ja, ja," segði kongurin." Far tú bara, so finna vit út av tí."

Bileam saðlaði síðani sín asna og fór avstað. Men hann hevði ikki riðið langt, tá ið asnin ikki vildi lýða boðum hansara. "Býtti asni", rópti Bileam og sló hann við sínum stavi. "Hví gert tú ikki eftir boðum mínum? Tað er ræðuliga troyttandi, at tú ikki heldur teg á vegnum."

Asnin kom so at enda inn á vegin aftur, men helt seg heilt úti við jaðaran, so at Bileam skøvaði beinið av einum grótveggi. " Bileam rópti á asnan, og meðan hann bresti við koyrlinum, spurdi hann asnan, hví hann var so tápuligur. Hvat tað var, sum hann gjørdi. Um hann ikki sá, hvussu bein hansara sá út?" Hann hevði næstan hug at trúgva Balak, tá ið hann segði, at heimurin var vorðin bannaður. Asnin hevði, ið hvussu so er, ongantíð verið so treiskur at fáast við sum henda dagin.

Knappliga legði asnin seg á vegin, mitt á vegin. Har hann lá pinnastillur og vildi ikki flyta seg úr stað. Tá gjørdist Bileam so illur, at hann kikkaði eftir ondini, áðrenn hann var klárur at skelda asnan. Men asnin var fyrr enn Bileam og spurdi hann:"Eri eg ikki tín góði, gamli asni, sum altíð hevur verið tær lýðin og havi fylgt tær. Hevur tú ikki kunnað litið á

meg, bæði tá ið tað hevur gingið við og ímóti? Hví situr tú so har og pískar meg við koyrlinum, sum um eg einki virði havi? Lat eygu tíni upp, so tú sært, hvat ið er fyri framman."

Bileam stardi bara bilsin upp á asnan og spurdi: "Dugir tú at tosa?"Síðani hoyrdi hann eina rødd siga:" Bileam, ver tú glaður fyri, at tú eigur ein so klókan asna." Tá Bileam hugdi upp, sá hann ein eingil mitt á vegnum, sum segði. "Tríggjar ferðir havi eg roynt at steðgað tær. Tríggjar ferðir havi eg forðað tær, men tú hevur verið bæði blindur og deyvur. Tú hevur ikki sæð og hoyrt so væl sum asnin. Tú heldur, at heimurin er bannaður. Men heimurin er vælsignaður. Tað sá tín asni, so lurta eftir honum. Ver glaður fyri tín asna. Annars hevði eg verið noyddur at dripið teg!"

Bileam bliknaði. Síðani segði hann: " Eg vendi við." Nei, svaraði eingilin, halt fram á ferðini til kong Balak, men minst til , at heimurin er vælsignaður, sjálvt um tað ikki altíð sær út, sum um hann er. Sig tað við Balak!"

Síðani fór eingilin, og Bileam bað asnan fyrigeva sær, meðan hann klappaði honum, og teir riðu so víðari til kong Balak.

Balak stóð ótolin og bíðaði eftir teimum, og tá ið hann sá teir, rópti hann: " Hvar blivu tit av, hetta var upp á hægstu tíð, at tit komu. Kom nú og skunda tær Bileam at banna tað bannaða fólkið. Bannað tann bannaða heimin. Hann er ikki meira verdur enn tað."

Balak fór síðani við Bileam upp á ein fjallatind, og Bileam lat munnin upp, men tað komu bara vøkur orð av munni hansara. Hann vælsignaði heimin og fólkið og breiddi gleði og ljós yvir fólkið.

Balak gjørdist óður og rópti: " Tú skuldi banna fólkið og ikki vælsigna tað. Tá spurdi Bileam Balak. " Hvussu kann eg banna, tá ið Gud ikki bannar. Hvussu kann eg lýsa vreiði yvir fólkið, tá ið Guð ikki er óður?"

Balak svaraði honum ikki, men førdi Bileam upp á ein annan fjallatind. Men aftur her komu bert vøkur orð av munni Bileams. Aftur vælsignaði hann heimin og fólkið. Síðani segði hann við Balak. " Guð er við fólki sínum. Tá Guð vælsignar sítt fólk, kann eitt menniskja ikki bannað tað. Men hoyr nú Balak, hvat eg síggi", endaði Bileam við harðari rødd. "Eg síggi hann, men kortini ikki. Eg hómi hann, men hann er ikki so nær enn. Ein stjørna stígur fram frá Jákupi. Hann skal verða til vælsignilsi."

"Ein stjørna - til vælsignilsi – skínandi klár – sum ein stjørnusól". Asnin stóð í fjósinum og mutlaði fyri seg sjálvan. Soleiðis var tað júst nú. Tað nýfødda barnið, í krubbuni, í fjósinum, sum lýsti sum ein stjørnusól.

Hetta barnið mátti vera Guðs vælsignilsi. Tað sum Bileam bert hómaði. Tað sum var fyri framman, men nú var barnið komið. Guðs vælsignilsi til heimin. Asnin gneggjaði hart av gleði.

So var tað satt. Tað sum Bileam og asnin høvdu sæð hin dagin. Og tað var óivað eisini tað, sum abbin vildi siga honum tann dagin, tá ið hann bert var ein lítil asni, sum var troyttur og um at missa mótið, tí at hann ikki orkaði at fylgja við. Heimurin kann síggja myrkur og bannaður út, men hann er vælsignaður av Guði. Tað er barnið í krubbuni eitt tekin um. Barnið er Guðs signing.

Og so gneggjaði asnin einaferð aftrat. Henda náttin var serstøk.

Leysliga umsett, Petra Gregersen

# BARNASÍÐAN

## Jólatræið

Longu í 1600-talinum var jólatræ brúkt í Týsklandi í sambandi við jólahátíðina. Eingin veit við vissu at siga, hví jólatræið er vorðið ein partur av jólunum, men søgnin sigur, at hesin siður av fyrstan tíð er komin úr Alsace í Týsklandi. Um jóltíðir í 1600-talinum skuldu nøkur børn framføra ein leik fyri íbúgvunum á staðnum, og leikurin var í trimum pørtum. Í sambandi við henda leikin, var eitt granntræ tikið inn og pyntað á jólum.

Fyrsti parturin, sum børnini framførdu, snúði seg um syndafallið, og tí høvdu børnini brúk fyri einum kunnskapartræi. Um veturin funnu tey einki súreplatræ og máttu tí brúka eitt granntræ ístaðin. Tey tóku síðani nøkur súrepli og hongdu tey upp á træið, og so kundu tey spæla leikpartin um syndafallið.

Annar partur var um Jesus, sum kom í heimin at frelsa syndarar. Tí settu børnini livandi ljós á træið, soleiðis at tey kundu lýsa og minna á Jesus, sum er heimsins ljós. Triði partur snúði seg um Jesus, sum er lívsins breyð og gevur teimum kristnu føði, fyri at tey kunnu verða varðveitt í honum. Hetta vístu børnini við at heingja breyð upp á træið.

Um tað er hesin leikurin, sum er orsøkin til, at vit í dag hava jólatræ á jólum, er ikki gott at siga, men ið hvussu so er, so hevur hesin leikurin ein góðan jólaboðskap. Latið okkum hugsa um hetta á jólum. Jólatræið kann vera ein mynd uppá, at syndin kom í heimin, men at Guð er sterkari enn syndin og sendi son sín Jesus at frelsa syndarar.

Niðanfyri er eitt jólatræ, sum er ein labyrint. Vitið um tit finna vegin gjøgnum labyrintina.



Umbróting:
Brandur Petersen

Prent:
Estra

Ábyrgd:
Dan J. Eliassen

Útgevari:
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Kongsgil 23 kj.
FO-100 Tórshavn
Tlf.: 282006
T-postur: kmf@kmf.fo
Heimasíða: www.kmf.fo
Konta: 9181-495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað
kemur út 8 ferðir um árið
( feb, mar, mai, jun,
aug, sep, nov, og des)

Haldaragjald: kr. 150,-